


# Hvar ert tú?

Tú hevur áræði og ert ágrýtin og opin.

Passar tú inn í hesa myndina, átti tú at søkt lærlingapláss hjá okkum.

Tú hevur HH, HF ella studentsprógv, og tað er ein fortreyt, at tú situr væl um sátt við telduna.

Uppgávurnar eru mangar, og tú kemur runt á øllum stovninum. Bæði í fyrisitingini, arbeiðsloysistryggingini og arbeiðsávísingini ført tú møguleika at royna teg.

Tú kemur at hava nógv samband við viðskiftafólk okkara, og krevur tað, at tú dugir væl at samskifta við fólk.

Verður tú skrivstovulærlingur hjá ALS, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.

Løn sambært sáttmála millum S & K og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknarfreistin er mánadagin 25. oktober og tú kanst byrja skjótast tilber. Meira fæst at vita við at venda tær til Elisabeth O. Gaardbo á tel. 349550.

ALS

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

Arbeiðsloysisskipanin
Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo

SANSIR TEL 355 355



STARVSLÝSING

## Verkfrøðingur til plan- og prosjektdeildina

Søkt verður eftir verkfrøðingi ella líknandi til plan- og prosjektdeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast.

Plan- og prosjektdeildin er deild undir vegadeildini.

Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja og standa fyri:
- Gera ætlanir fyri trygdartiltøk
- Programmeringar, forkanningar, prosjektering og prosjektgransking
- Eftirlit við verkætlanum
- Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving og við royndum innan omanfyri nevndu virkisøki. Størur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi, hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, eggja og ganga undan.

**Setanarviðurskifti**
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:

Landsverk
Postboks 78
110 Tórshavn

og skal verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. oktober 2004.
Merkið brævbjálvan "Verkfrøðingur til vegadeildina".
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Finnleifi Durhuus, leiðari av vegadeildini, á tel. 31 13 33, teldupostur: finnleif@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

www.sansir.fo



# VARPIÐ

Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag

SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2






FØROYAPRENT
www.foroyaprent.fo · Tel. 314 555 · Fax 318 026




# Býarmenningin - Tórshavn 1856-1954

**Tórshavnar Býarsavn og Landsskjalasavnið lata upp framsýning í Snarskivuni í dag, hósdagin 30. september kl. 16**

FRMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Talan er um somu framsýning, sum var í Smiðjuni í Lítluvík á ólavsøku.

Evnið er um býarmenningina í tíðarskeiðinum frá 1856, tá ið Thorshavns Bygningskommission, bygginevndin, fór at virka og fram til 1954, tá ið løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir varð samtykt.

Miðskeiðis í 1860-árunum kom tann fyrsta byggiætlanin fyri gomlu Havnina, og umleið 1880 sæst, at Tinghúsvegurin fær skap og somuleiðis býlingurin úti í Bø, t.e. Bøgøta, Tróndargøta og Magnus Heinasonar gøta.

Ætlanin við framsýningini er somuleiðis at fáa fram, hvussu Havnin tók at vaksa fyrst í 20. øld. Útstykkingar vórðu gjørdar, og býlingurin í Abbatrøð og høvuðsgøturnar niðan til Rabarbukvarterið gjørdust veruleiki.

Seinast í 1940-árunum fluttu fólk í stórum tali til Havnar, og býlingarnir í Hornabø og úti í Grønlandi sóu dagsins ljós. Tað var eisini um hetta mundið, at løgtingið fór at viðgera lógina um býarskipanir og byggisamtyktir. Fyri Havnina var tað í tøkum tíma. Arbeiðið byrjaði alt fyri eitt, men ikki fyrr enn í 1972 varð tað liðugt. Tá kom almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu í gildið.

Á framsýningini eru fotomyndir, kort, tekningar og skjøl, sum vísa, hvussu bygginevndin hevur arbeitt, og hvussu fólk í Havn hava hugsað, tá ið tey hava søkt nevndina um byggiloyvi til sethús og umbyggingar. Á framsýningini eru eisini umsóknir frá handlum, fyritøkum og almennum embætum.

Framsýningin í Snarskivuni er opin fram til 26. november, mánadag til fríggjadag frá kl. 9 til kl. 16, tó hósdag til kl. 18.


WWW.SMYRIL-LINE.COM

## Check-In til Norrönu

Í sambandi við at Norröna í oktober siglir kl. 20.00 í staðin fyri kl. 20.30, sum lýst í ferðaætlanini, verða check-in tíðirnar eisini broyttar.

Byrjað verður at checka-in **kl. 18.00.**

Allir bilar skulu vera á bryggjuni í seinasta lagi **kl. 19.00.**

Check-In verður **stongt kl. 19.45.**

Skipið siglir **seinast kl. 20.00.**

Tlf 34 59 00 · Fax 34 59 50
T-postur: office@smyril-line.fo



P/F ALMA
Maskinverkstaður & Smiðja

CATERPILLAR
Entreprenørmaskinur við fígging





Á hjalla 15 · Boks 1338 · 110 Tórshavn · tel 31 58 90 · fax 31 04 68 · jan@alma.fo



## Stovnið breiðband fyri

0,- kr.*)

Prísir úr 280,- kr./mðr.

Stovnar tú I-net Privat Breiðband frá Føroya Tele, geva vit tær stovningina púra ókeypis - tú sparir 750,- kr.

Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...

I·net BREIÐBAND

**) Treytað av at tú teknar I·net privat breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 1. novembur 2004. Vanligur prísur fyri stovning er kr. 750,-. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.*

FØROYA TELE